# TAÐ SIGA ÚTLENDINGAR UM FØROYSKU SHOWINI Á MÓTAVIKUNI



*Eivør Pálsdóttir sang á pallinum hjá Barbaru í Gongini.*

*Fyrstu reaktiónirnar uppá mótashowini hjá Guðrun&Guðrun eru ómetaliga positiv. Avísin Dansk Daily rósar báðum merkjunum, og bloggarar úr Danmark, Svøríki, Finlandi og Onglandi eru bergtiknir. Eisini fingu bæði Guðrun&Guðrun og Barbara í Gongini rós frá Metro Express fyri tónleikaligu innsløgini á sýningunum.*

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eydna Skaale
**MYNDIR:** Beinta Haraldsen

Í FARNU VIKU VAR **COPENHAGEN FASHION WEEK** HILDIN, OG TVEY AV FREMSTU **FØROYSKU** MERKJUNUM HØVDU STÓRAR SÝNINGAR Á VIKUNI. BEINT EFTIR SÝNINGARNAR VÓRU AFTURMELDINGARNAR SERA **POSITIVAR**, MEN VIT HAVA TIKIÐ PULSIN NÚ EINA VIKU SEINNI. HVAT HELDUR UMHEIMURIN UM FØROYSKT **DESIGN**?

**Dansk Daily - avísin, skrivað av mótakennarum í Danmark, sum kom út í sambandi við mótavikuna, skrivaði soleiðis um Guðrun&Guðrun:**



Guðrun&Guðrun

## Bundið – í øllum sniðum og støddum

Í einum bundnum hvítum kjóla kom sangarinnan Aura á pallin. Hon minti mest um ein glitrandi svana. Hon sang, sum reina, rennandi vatnið í føroysku áunum og skapti perfekta huglagið til føroysku sýningina, sum vísti klæðir til kvinnur og menn.

Til kvinnur vóru pløggini bundin við stórum eygum, bæði til niðurdeilar, kjólar og blusur, og hetta prógvaði, at bundin pløgg kunnu vera løtt sum fjaðrar. Troyggjurnar vóru bundnar á ymsar øðrvísi hættir, sum góvu vanligu sniðunum orku og spæl.

Til menn vóru klæðini meiri fjølbroytt, og vístu bæði grova binding, lætt bundnar undirtroyggjur og cardigans við stuttligum detaljum, m.a. stórum holum. Alt varð stylað við leðurbuksum.

Tey, ið kenna nakað til Guðrun&Guðrun kendu uttan iva stjørnurnar aftur, sum gjørdust kendar við høvuðsleiklutinum í »Forbrydelsen«. Hvíta mynstrið á myrkari grund varð nýtt til ein kjóla til kvinnur og øvuðgt til eina mannfólkatroyggju.

Sýningin vísti øll aspekt av binding, og hon vísti eisini virðing fyri rótunum, sum merkið er sprottið úr. Men sýningin vísti eisini eina sterka kenslu av nýhugsan.

**Dansk Daily skrivaði hetta um Barbaru í Gongini:**

## Ein avantgarde garderoba

Enn einaferð hevur Barbara í Gongini ryst norðurlendska grundvøllin við at vísa eina kollektión av formum og eginleikum, sum vóru so undrunarverdir, at tað er eyðsýnt hví Gongini er skýrd at vera ein í nýggja ættarliðnum av stórum sniðgevum.

Tá modellirnar, sum framtíðarkendir stammukrígsmenn trinu á pallin ein fyri og onnur eftir við stórum hári, svørtum zombie eygum og hvítari húð, kendi tú beinanvegin ta myrku og ráu attituduna, sum er kennimerkið hjá Gongini.

Nýtslan av plastikki, metalli, leðri og pelsi í svørtum og gráum litbrigdum vístu, at Barbara hellur til tað, sum hoyrir nátturuni til, umframt fair-trade framleiðslu.

Barbara í Gongini er drotningin av tí, sum er øðrvísi, og hendan kollektiónin skuffaði ikki. Hon vælsignaði okkum við einum bundnum fiskagarnskjóla, einum regnfrakka við einum slipsi, einum yvirvaksnum, bundnum hundalandshatti, eini framúr góðari tulking av einum skrelliposa, ið var seymaður til ein kjóla, eini heildrakt úr fleece við lynlási, sum mest av øllum minti um eina sofistikeraða krígsklára bjørn.



Barbara í Gongini

Tulkingin av frumevnunum í náttúrini og tí ráa norðurlendska, samantvinnað við eini djúpari listarligari fatan, undirstrikaðu sermerkta avant-garde merkið hjá Barbaru í Gongini. Gongini fær teg at syngja: Break on through to the other side (lagið, sum showið endaði við, blaðkv.)